

Á myndini síggja vit Johan Mortensen og Páll Kunoy, stjóra á sjóartryggingardeildini hjá TRYGD heilsa uppá ein toppmann í OPEC, Dr Ghanem, skrivara hjá The General Secretary, stjóranum, í OPEC í høvuðssætinum í Wien. Myndin er tikin frammafyri formanssessinum í OPEC, har nógvar stórar avgerðir vera tiknar, sum eisini ávirka viðurskiftini í Føroyum. Páll Kunoy og Johan Mortensen eru báðir av teirri sannføring, at tað er sera týdningarmikið, at føroyska vinnulívið hevur samband við stórar aktørar sum OPEC.

OPEC vitjan í summar:

# Føroyar eiga at hava tættari samband við arabiska heimin

**– Føroyar eiga at knýta handilslig bond við arabisku londini, sum kunnu vera ein framtíðar marknaður fyri føroyskar vørur. Eisini eiga vit at taka upp samstarv við OPEC. Finna vit olju eiga vit eisini at umhugsa limaskap har heldur Johan Mortensen, vinnulívsmaður, sum nakað herfyri vitjaði á høvuðsborgini hjá OPEC í Wien**

Samstarv
*Jan Müller*

Út ímóti helminginum av allari oljuframleiðslu í heiminum í dag kemur frá londunum, sum eru í felagsskapinum OPEC. Hesin felagsskapur hevur tí eina sera stóra ávirkan á heimsbúskapin. Johan Mortensen, stjóri í Havn hevur altíð havt áhuga fyri olju og gassi og hevur hann í fleiri ár havt samband við OPEC. Johan Mortensen sigur við Sosialin, at OPEC fylgir væl við, hvussu gongur við okkara oljuídnaði og skilur hann, at vit eru vælkomin at tosa um samstarv og entá limaskap, tá tað einaferð, vónandi, verður ein føroysk oljuframleiðsla. Umframt at røkja oljumarknaðin ger OPEC eisini sera nógv fyri limalondini. Persónliga heldur Johan Mortensen, at tað kundi verið til fyrimunar fyri Føroyar at verið limur og áttu vit longu nú at havt eitt politiskt samband við OPEC heldur hann.

Nakað herfyri vitjaðu Johan Mortensen og Páll Kunoy, tryggingarmaður á høvuðsborgini hjá OPEC Í WIEN. Johan Mortensen hevur leingi havt ætlanir um at fáa eitt umboð fyri OPEC til Førya at halda ein kunnandi fyrilestur um OPEC. Hesin kundi hóskandi verið hildin í Oljutinginum. Væntandi verður vitjanin nú í summar.

Johan Mortensen heldur annars, at tað er av stórum týdningi, at almennu Føroyar hava samband við slíkar felagsskapir og vónar hann, at eitt nú løgtingslimir, sum eru á vitjan hja ST eins og hjá øðrum týðandi felagsskapum, duga at knýta diplomatisk sambond, sum kunnu verða Føroyum at gagni. Sum vinnulívsmaður heldur Johan Mortensen, at tað eru stórir møguleikar fyri føroyskt vinnulív bæði í Mið- og fjareystri og gera vit alt ov lítið av at orientera okkum handavegin. Eitt nú hevur Føroyar onki samband yvirhøvur við arabiska heimin. Tað heldur hann vera spell, tí her liggja helst marknaðir fyri ávísum føroyskum vøum. Johan Mortensen fegnast annars um tær royndir, sum føroysk vinnulívsfólk hava gjørt fyri at kunna seg við marknaðirnar í bæði Miðeystri og Fjareystri. Fyri stuttum vórðu umboð fyri vinnulívið m.a. á vitjan í bæði Japan og Kina.

Johan Mortensen hevur av sínum eintingum tikið stig til, at ein føroysk sendinevnd fer til Saudi Arabia at kanna møgulleikarnar fyri einum handilsligum samstarvi millum Føroyar og Saudi Arabia. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, er kunnaður um hesar ætlanir; skilst.



*Johan Mortensen her á høvuðsborgini hjá OPEC í Wien.*

# PRIX

NR. 53 • TÝSDAGUR • 18. MARS 2003 • 77. ÁRGANGUR • WWW.SOSIALURIN.FO

**Hálvfinalan**

Leygarkvøldið var sætta og seinsta innleiðandi umfarið í Prix Føroyum hildið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bólkarnir spældu í hesi røð:
Fluffy Toys
Gestir
Headache Blues Treo
Mnd's Eye
Lawetz

10 dómarar mettu um avrikini á pallinum, og teir dømdu út frá fimm ymiskum krøvum um millum annað tónleikaliga dygd, spæl og framførslu.

Endin var, at Gestir fóru við seinasta finaluplássinum í Prixnum 2003.

# Tað var futtur í

**Hálvfinalan í Prix num bjóðaði fimm væl upplagdar bólkar, sum kýttu seg til tað seinasta fyri at sleppa inn í lovaða landið – stóru Prix-finaluna**

PRIXIð
*Eyðun Klakstein*



*Fluffy Toys løgdu fyri leygarkvøldið, og teir vóru í rætta essinum. Teir spældu góðan rocktónleik og høvdu eina lívliga framførslu.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Teir fimm bólkarnar, sum leygarkvøldið fingu seinasta møguleikan at spæla seg í finaluna í Prixnum, løgdu nógv fyri á pallinum. Bólkarnir vóru sera væl upplagdir, og teir høvdu fyrireikað seg væl til stóra kvøldið.

Líka frá tí, at teir væl svingandi rockarnir í Fluffy Toys komu á pallin, og til teir funkutu Lawetz spældu seinastu tónarnar í kappingin, var dygdin í tónleikin góð, og framførslurnar vóru sum heild sera góðar.

Summir bólkarnar høvdu aftur hesaferð tikið stórskíggjan í nýtslu, aðrir høvdu livandi ljós við á pallin, og kjarnin í tí heila var eitt gott tónleikaligt upplivilsi við fimm sera ymiskum bólkum.

## Fegnir vinnarar

Vinnarin hetta kvøldið gjørdist bólkurin Gestir, sum er mannaður við tónleikarum úr Gøtu, Leirvík og Fuglafirði, og teir vóru ovurfegnir og eitt sindur bilsnir um úrslitið.

– Eftir at vit høvdu verið á pallinum, hildu vit, at nú var Prixið liðugt. Vit høvdu eina kenslu av, at vit fóru ikki at koma víðari, og tí vóru vit sera kløkkir, tá ið vit vóru útnevndir sum vinnarar, sigur Knút Eystursteín, sum er ein av tónleikarunum í bólkinum.

– Vit eru sera glaðir og takksamir fyri úrslitið, ikki minsta tá ið vit hugsa um, hvussu væl bólkarnir spældu leygarkvøldið. Allir bólkarnir kundu havt verið við í finaluni, og mær dámdi sjálvur sera væl Mind's Eye.

## Spæla meira

Gestir eru ein nýggjur bólkur, sum bara hevur spælt nakrar fáar ferðir alment. Men teir hava longu gjørt so nógv vart við seg, at teir eru vorðnir sjónligir á føroyska tónleikapallinum.

– Nú fara vit at halda frí í nakrar dagar, men so fara vit undir at venja aftur og skriva nýggjar sangir. Vit ætla eisini at spæla á fleiri konsertum næstu tíðina, tí vit vilja hava tónleikin hjá okkum út til fólk, sigur Knút Eystursteín.

– Vit hava fingið eitt stórt herðaklapp í Prix Føroyum, og tað eru vit sera fegnir um. Vit spæla ikki júst festligan tónleik, men fólk taka sera væl ímóti okkum, og tað var gott lív í leygarkvøldið, tá ið vit spældu.

## Stór vælvild

Gestir høvdu bara eina viku til at fyrireika seg til hálvfinaluna, eftir at teir vóru blivnir nummar tvey í seinasta regluliga undanum - farinum, og tað gjørdi, at teir máttu venja nógv í síðstu viku.

Teir venja í Gøtu, og fleiri aðrir bólkar, sum venja í sama høli, lótu ídnu tónleikararnar í Gestum sleppa framat fleiri ferðir, tá ið teir ikki høvdu venjingartíðir, og tað kom væl við hjá finalubólkinum.

– Vit hava fingið sera nógv góða hjálp, og hinir bólkarnir hava verið sera lagaligir móti okkum. Tað er sera positivt at uppliva, sigur Knút Eystursteín.

## Aðrir gjørdu vart við seg

Fleiri av hinum bólkunum í hálvfinaluni hava gjørt vart við seg, og nú skulu næstu mánaðirnir vísa, hvat teir fáa burtur úr hesum.

Fluffy Toys hevur verið ein virkin bólkur í fleiri ár, og teir hava seinastu vikurnar verið úti og spælt til dans fleiri ferðir. Tað nýggja hjá teimum er, at teir eisini eru farnir at spæla sín egna tónleik.

Klaksvíksbólkurin Mind´s Eye er eitt spennandi navn, og teir hava onkra uppgávu fyri framman. Teir ætla at dríva á næstu tíðina, og málið er at skriva fleiri sangir.

Headache Blues Treo er mannaður við virknum tónleikarum, men ivasamt er, hvussu tað verður við júst hesi samansetingini framyvir.

Og so er tað ungi bólkurin Lawetz, sum eisini umhugsar, hvat framtíðin skal brúkast til. Ein av tónleikarunum í bólkinum er nirði í løtuni, og tí er óvist, hvussu tað verður við bólkinum komandi tíðina.